## Tróndur í Glyvra kirkju

Málningaframsýning verður í Glyvra kirkju fríggjakvøldið 22. oktober kl. 20. Tað er Tróndur Patursson (myndin), ið sýnir fram. Listamaðurin fer eisini at greiða frá síni myndlist. Hetta er samstundis eitt av fyrstu tiltøkunum á Mentanarvikuni.



## List og kvirra

Frá mánakvøldi til leygarkvøld millum kl. 20 og 22 verður tiltakið »List og Kvirra« á sama staði. Her sýnir Tróndur Patursson fram. Høvi er at njóta kvirruna í skýmliga kirkjurúminum og at tendra ljós í teirri serstaku ljóskolbuni. Aftanbøn er mánakvøld, mikukvøld og fríggjakvøld kl. 21.45. Og sunnukvøldið 31. okt. kl. 20 verður sangkvøld í Glyvra kirkju undir heitinum: »Vit syngja nýggjar sálmar«. Kór Glyvra kirkju tekur eisini lut.



*Anna Faroe fer nú at læra komandi songstjørnur tey fyrstu stigini innan sangteknikk*

# Anna lærir ung at syngja

**Á Mentanarvirkuni verður eitt sonevnt »Master Class Sangskeið«. Lærari er kenda føroyska songkvinnan, Anna Faroe**

Nú fáa øll ung millum 10 og 18 ár møguleika til at melda seg til eitt 2-daga Master Class sangskeið. Anna Faroe hevur sjálv gingið á Complete Vocal Institute í Keypmannahavn, har hon millum annað hevur lært sangteknikk.

– Anna hevur stóran hug at læra frá sær og vónar stóra undirtøku í Mentanarvikuni, siga fyrireikararnir.

Sangskeiðið verður hildið í Løkshøll mánadag og týsdag frá kl. 15.30 til 18.30.

Luttøkugjaldið er 350 kr. fyri hvønn og tilmeldingin fer fram á tlf. 566604 og 666600.

**Nær og hvar:**
Løkshøll, mánadag og týsdag frá kl. 15:30 til 18:30.

# Út við strongd – inn við lívsgleði

**FYRILESTUR** **Millum tey mongu spennandi tiltøkini á FAROEXPO er ein - ella rættari: tveir - upplýsandi fyrilestur um Strongd og Lívsgleði í Løkshøll, hósdagin 28. oktober. Tað er klaksvíkingurin, Niclas Heri Jákupsson sum kemur at halda báðar, sum hann undir einum hatti kallar: Út við Strongd – Inn við Lívsgleði. Tiltakið er bæði ætlað privatpersónum og arbeiðsplássum**

Strongd er blivin ein fólkasjúka. Nýggjar kanningar vísa nevniliga, at 4. hvør persónur í Evropa, hevur merkt til strongd yvir eitt longri tíðarskeið.

Tað er ymiskt hvør keldan er til strongdina, men tá eitt menniskja fær strongd, so rakar tað bæði arbeiðsplássið og familjuna. Líkamikið hvat keldan til strongd kemur frá, so er umráðandi at man ger nakað við støðuna, ÁÐRENN hetta gerst ein trupulleiki.

Í fyrilestrinum verður komið inn á, hvat munurin millum positiva og negativa strongd er; hví vit fáa strongd; strongd á arbeiðsplássinum; likamlig og sálarlig tekin uppá strongd; fylgjur av at liva við strongd; viðgerð av strongd; sjálvsálit og sjálvsvirðing, umframt nøkur góð ráð.

### Lívsgleði smittar

Eftir ein lítlan steðg, kemur fyrilesturin um Lívsgleði, sum Niclas Heri kallar "Born to be alive".

Hetta er ein jaligur, undirhaldandi og litríkur fyrilestur, sum avgjørt er ein góður mótpolur til strongd. Í fyrilestrinum verður komið inn á, hvat lívsgleði er; innaru- og uttaru virðini; um at lívið er ein gáva; hvussu vit venja okkum við broytingum; um tankar og dreymar; virðir og trúgv; mál og fokus; avbjóðingar og ótta; um at læra seg at hugsa jaligt; at njóta sansirnar og útstrála gleði, og um at liva her og nú.



*- Líkamikið hvat keldan til strongd kemur frá, so er umráðandi at man ger nakað við støðuna, áðrenn hetta gerst ein trupulleiki. Niclas Heri Jákupsson fer at halda fyrilestur um strongd og lívsvirði*

### Tilmelding og annað

Fyrilestrarnir varða tríggjar tímar og er kostnaðurin einans 150 kr. fyri hvønn.

Tilmelding til tiltakið kann gerast við at ringja til felagið Fegin, tlf. 525525, á t-post fegin@fegin.fo, ella við at tekna seg á heimasíðuni www.fegin.fo

**Nær og hvar:**
Løkshøll, hósdagin 28. oktober kl. 19.